# Hvaðani stavar tað?

JÓLINI OG YMISKU SIÐIRNIR, TILTØKINI OG ANNAÐ, IÐ VIT GERA HESA ÁRSINS TÍÐ, ERU SO INNGRÓGVIN Í MENTAN OKKARA, HUGA OG VANAR, AT TAÐ KANN VERA TRUPULT AT SIGA, HVAT UPPRUNIN ER TIL TAÐ YMISKA. MEN ALT HEVUR EIN UPPRUNA, OG HÓAST NÓGV AV TÍ ER MERKT AV MÝTUM OG IVASOMUM SØGUM, SO ROYNA VIT HER AT GEVA NØKUR SVAR UPP Á UPPRUNAN TIL YMISKT AV TÍ, IÐ HEVUR FINGIÐ EITT PLÁSS Í HUGNALIGU HØGTÍÐINI

**Hallur av Rana**
*hallur@sosialurin.fo*

## JÓLATRØ

Mett verður, at siðurin við jólatrøum stavar upprunaliga frá Týsklandi fyrst í 16. øld og var í stóran mun ein protestantiskur siður. Fyrsta skriftliga keldan um træið sum jólapynt er frá Strassburg í 1605 og fyrsta keldan, ið nevnir livandi ljós á trænum er úr Leipzig í 1632. Vanligt var at pynta salir og hallir við trøum. Síðani vóru køkur og frukt hongd á træið og trettanda dag eftir jól sluppu børnini at heysta træið.

Fyrr var jólatræið fyrst og fremst pyntað við pappíri og hálmi, onkur nýtti keks og smákøkur. Í dag hava flestu familjur sína egnu siðvenju, ið sum oftast er ein samanblanding av nýggjum og gomlum. Áður plagdi stjørnan ovast í trænum at vera úr silvurpappíri ella líknandi, men í hesum døgum er hon oftast úr plasti og er gjarna elektrisk.

Fyrsta jólatræið í Danmark stóð í 1808 pyntað á Holsteinborg í suður-Sjællandi. Um leitað verður eftir jólatrøum í tidarrit.fo, sæst at fyrstu ferð føroysku bløðini nevna jólatrø er síðst í 19. øld, men í samrøðu við Sosialin fyri tveimum árum síðan segði Jóan Pauli Joensen, fólkalívsfrøðingur, at tey gjørdist kortini ikki vanlig í Føroyum fyrr enn einaferð í 20. øld.

At byrjan við vóru jólatrøini ein luksusvøra, ið danskir embætismenn og onnur, ið vóru væl fyri fíggjarliga, høvdu ráð at keypa, men eftir 2. veraldarbardaga gjørdust jólatrø eisini nakað, ið flestu føroyingar áttu á jólum. Hetta var um tað mundi, tá tað var vorðið lættari at keypa vørur úr restina av Evropa.

## JÓLAMAÐURIN

Vanliga verður sagt, at søgan um jólamannin hevur sín uppruna í munkinum Sankta Niklas, ið varð borin á heim í býnum Patara í ár 280 og seinni gjørdist biskupur í havnarbýnum Myra í Lýkia.

Sambært søgnini um Sankta Niklas var hann ein gávuríkur persónur, ið gav alt sítt ríkidømi til tey, ið høvdu brúk fyri tí, og halgaði lív sítt til at hjálpa teimum sjúku og fátøku.

Sum øldirnar gingu ferðaðust søgurnar um Sankta Niklas víða um og í endurburðartíðini var hann vorðin tað best dámda halgimenni í Evropa og var verjin hjá børnum, handilsmonnum og sjómonnum. Í 13. øld varð stóra barnafestin í Fraklandi løgd 6. desember, ið er minnisdagur Sankta Niklas. Hendan dagin var siðvenja, at geva gávur til børnini.

So væl dámdur var hann, at tá fleiri halgimenni mistu undirtøku eftir trúbótina, hildu fólk fast um biskupin úr Patara, og so líðandi byrjaði hann at líkjast jólamanninum, ið vit kenna í dag.

Mett verður at siðvenjan við jólamanninum er komin til Føroyar úr Danmark í 20. øld, men er hann í Føroyum nakað øðrvísi enn aðrastaðni. Í sanginum "Eg eri jólamaðurin" hjá Marius Jóhannesen verður nevnt, at hann er í koti og svørtum knæbuksum, meðan bústaðurin er í einum hulduheyggi. Í Føroyum hava jólamenninir eisini fingið nøvn sum Kertustubbi og Greytasleikur, ið serliga blivu kend í Føroyum, tá teir í 90'unum vóru at hoyra í Barnaútvarpinum hjá Útvarpi Føroya, har føroysk børn kundu ringja inn til teirra.

## JÓLAMATUR

Tað er øgiliga ymiskt hvat føroyingar eta á jólum, og fevnir tað millum annað um gás, dunnu, ræst kjøt, ræstan fisk og fleskasteik.

Upprunaliga var tað serliga ræstur fiskur, ið var jólamatur í Føroyum. Hesin fiskur bleiv kallaður aftansfiskur. Tey sum áttu jørð ótu eisini fekst og ræst kjøt á jólum.

Siðvenjan við at eta gás og dunnu á jólum er fyrst vorðin vanlig fyrst í 20. øld, tá komfýrar gjørdist vanligir í Føroyum.

## JÓLASKIP

Tað eru í ár 29 ár síðan, at fyrsta jólaskipið í Føroyum kom siglandi inn á Klaksvíkina. Tað vóru Niclas Heri Jákupsson og Emil Gunnarstein, ið ynsktu at gera nakað serligt fyri børnunum í býnum á jólum.




*Fyrsta jólakortið*

Fyrsta jólaskipið var reyði og jólaligi AWI 27 báturin hjá pápa Niclas Hera. Pápi Emil hjálpti at pynta bátin, og pápi Niclas Hera var skipari. Teir væntaðu ikki nógv fólk fyrsta árið, men tá jólaskipið kom siglandi inn eftir vágni, blivu teir bilsnir av, at so nógv fólk vóru møtt upp. Uppmøtingin var so mikið góð, at neyðugt var at keypa fleiri karamellueskjur, so at øll børnini fingu karamellur.

Við árunum mentist tað, fleiri fólk løgdust aftrat, skótarnir og Klaksvíkar hornorkestur gjørdist partur av tiltakinum og gjørdist jólaskipið ein fastur táttur í jólunum í Klaksvík.

Síðan eru fleiri jólaskip løgst aftrat runt landið og eru jólaskipini í dag eitt av hæddarpunktunum í jólunum hjá børnum kring alt Føroyar.

## JÓLAKORT

Siðvenja við at senda jólakort hevur sín uppruna í Stóra Bretlandi í 1843. Sir Henry Cole, ið var embætismaður hjá stjórnini, hevði lagt lunnar undir nýggja bretska postverkið, og ynskti at gera eitthvørt, ið fekk vanligar borgarar at brúka hesa nýggju tænastu.

Hann vendi sær til vinmannin John Horsley, ið var listamaður, og sama gjørdu teir fyrstu jólakortini, ið blivu seld fyri eina skilling, ið er umleið ein króna. Umleið 1.000 kort blivu seld fyrsta árið.

Við tíðini vaks undirtøkan fyri jólakortum og fyrst í 20. øld spjaddi siðvenjan seg til restina av Evropa. Men longu 1896 kundu føroyingar keypa føroysk jólakort. Tað sæst nevniliga í einari lýsing í Føringatíðindi frá 3. desember 1896.

- Jólakort og onnur fittlig og prýðulig kort við Føroyskari skrift eru at fáa hjá D. Ísaksoni (í geil), ljóðaði lýsingin.

Aðrastaðni í blaðnum sæst eisini, at Djóni í Geil verður róstur fyri hetta avrik.

- Föroysk jólakort: Jólakort eru nakað av tí dámliga nýggja, sum »civilisatiónin« hevur fört til landið. »Djóni í Geil« eigur prís fyri, at hann er fyrsti maður, sum selur slík kort við Föroyskari skrift, stóð at lesa í blaðnum.



**Föroysk Jólakort.** Jólakort eru nakað av tí dámliga nýggja, sum »civilisatiónin« hevur fört til landið. »Djóni í geil« eigur prís fyri, at hann er fyrsti maður, sum selur slík kort við Föroyskari innskrift.

*Triðja desembur 1896, lýsing av fyrsta Føroyska jólakortinum*



LYSINGAR.

Jólakort og onnur fittlig og prýðulig kort við Føroyskari skrift eru at fáa hja **D. Ísaksoni** (í geil).



## JÓLABORÐHALD

Jólaborðhald ella jólafrokost er ein siðvenja, ið hevur sítt uppruna í teimum skandinavisku londunum undir 2. veraldarbardaga.

Tað var undir hersetingini, at fólk komu saman á arbeiðsplássinum til eina felags máltíð í jólamánaðinum. Men hóast kríggið fekk ein enda, so var nýggja siðvenjan lív lagað, tí fólk hildu fram við at savnast til felags máltíðirnar.

At byrja við høvdu máltíðirnar ikki nakað heitið, men eftir at fleiri og fleiri fyritøkur tóku undir við nýggju siðvenjuni, byrjaði man í 1950'unum at kalla tað fyri jólaborðhald ella jólafrokost.

Síðan tá hevur jólaborðhaldini ment seg nógv. Tað er ikki longu bara avmarkað til starvsfelagar, men verður jólaborðhald nú skipað í øllum hugsandi sosialum bólkum. Familjur, vinir, bindiklubbar, gamlar floksfelagar og onnur møtast til hugnaligu samveru í oktober, november, desember ella januar mánað.

Harumframt er jólaborðhald farið at handlað um so nógv meira enn bara mat, hóast at maturin enn hevur stóran týdning. Men í dag er jólaborðhald eitt kvøld fylt við mati, drekka, undirhaldi, dansi, vinskapi og nógvum aftrat.

## RÍSALAMANG

Kaldur rísgreytur ella rísalamang eru føroyska heitini fyri kenda dessertina, ið flest føroysk húskir munna njóta, tá tey eru liðug við høvuðsrættin á jólum, og við endan av desember mánað hava føroyingar etið túsundtals av litrum av dessertini, ið er vorðin ein inngrógvin partur av føroyska jólamatinum.

Tí ikki bara er dessertin á borðinum jólaaftan, men verður ætturin vanliga bjóðaður til jólaborðhald, føðingardagar og seldur í handlum og matstovum gjøgnum allan desember mánað.

Sambært Sprotanum, so er talan um kaldan rísgreyt, ið er rørdur saman í róma við mandlum í.

Rísalamang hevur sín uppruna í Danmark. Greytur var ein vanligur táttur á døgurðaborðinum hjá dønum, har man át tað sum forrætt, so man ikki át seg mettan av dýra kjøtinum. Um jóltíðini skuldi hesin greytur vera fínari og síðst í 19. øld byrjaði man at gera hann við bóndamjólk, rís, mandlum og pískaðum róma. Av tí at franska mentanin var høgt í metum um hetta mundi, fekk nýggi greyturin eitt franskt-líknandi navn, hóast hann einki hevur við Frakland at gera.